Nr. 99/2019

Jóhannis Joensen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur viðvíkjandi atkomuviðurskiftum í almennum bygningum, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hvussu nógvir almennir bygningar eru, har rørslutarnað, t.d. fólk í koyristóli, ikki hava góð atkomuviðurskifti?
2. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at oyramerkja pening á fíggjarlógini til at betra um atkomuviðurskiftini í landsins bygningum komandi árini?

Viðmerkingar

Góð atkomuviðurskifti hava avgerandi týdning fyri lívsgóðskuna hjá borgarum okkara, sum hava rørslutarn. Men tíverri eru hesi viðurskifti ikki altíð í lagi, hvørki í privatum ella almennum bygningum, og tí uppliva hesi stórar avmarkingar í lívinum. Tá nýggir bygningar verða bygdir í dag, verða krøv sett um góð atkomuviðurskifti. Men tá ið gamlir bygningar verða gjørdir um, eru ongar treytir um góð atkomuviðurskifti, og fleiri av landsins bygningum standa ódagførdir við vánaligum atkomumøguleikum.
Landsverk varðar av landsins bygningum, 185 í tali, sum samanlagt fevna um 240 túsund fermetrar. Á fíggjarlógini fyri 2020 eru 21 miliónir kr. settar av til at umvæla, viðlíkahalda og bjálva landsins bygningar. Í fíggjarlógini stendur eisini at lesa, at bygningar landsins yvirhøvur eru í ringum standi, tí alt ov lítið hevur verið játtað til viðlíkahald í nógv ár. Landsverk metir, at eftirsleipið bara við at umvæla og viðlíkahalda landsins bygingar er 270 miliónir kr., og tí er trupult at síggja fyri sær, at peningur til bøtt atkomuviðurskifti skal finnast á hesi játtan.
Tørvur er á at fáa eitt yvirlit yvir trupulleikan. Og tørvur er somuleiðis á eini meting frá politiska myndugleikanum um, nær fólk við rørslutarni kunnu vænta sær betri atkomuviðurskifti.

Á Løgtingi, 12. juni 2020

Jóhannis Joensen